# Frá vakstrarhúsi til ellisheim

**Vakstrarhúsið í Kirkjubø verður niðurtikið. Kommunan hevur ætlanir um at byggja ellisheim á staðnum**

ELDRARØKT
*Edvard Joensen*



*Vakstrarhúsið í Kirkjubø verður niðurtikið, og nýtt ellisheim skal byggjast á grundina*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kirkjubøar Kommuna hevur gjørt ein verkætlan, sum umfatar ellisheim í Kirkjubø. Ætlandi skal nýggja ellisheimið byggjast har, vakstrarhúsið í bygdini hevur staðið.

Anfinn Brekkstein, borgarstjóri í Kirkjubøar Kommunu, sigur, at kommunan hevur gjørt eina verkætlan, sum umfatar bygging av ellisheimi í Kirkjubø. Hetta varð gjørt út frá teirri ásannan, at ørvurin á plássum til tey eldru, i Suðurstreymoy er øgiliga stórur, sigur hann.

Kirkjubøar Kommuna keypti vakstarhúsið í Kikjubø og samtykti at lata tað taka niður og so byggja ellisheimið aftur á grundina.

Niðurtøkan varð boðin út, og tað arbeiðið er um at vera liðugt nú, sigur borgarstjórin.

Í verkætlanini hjá Kirkjubøar Kommunu verður kostnaðarmetingin fyri ellisheimið sett til 14,4 milliónur krónur, tá klárt er at flyta inn. Roknað verður við 10 búplássum, sigur Anfinn Brekkstein. Av hesum kostnaðinum hevur kommunan roknað við, at landskassin fer at rinda tær fimm milliónirnar, sigur hann.

Tað er soleiðis, at stuðul kann latast frá tí almenna til bygging av ellisheimum. Stuðulin er kr. 500.000,- fyri hvørt búplássið ella í mesta lagi helvtina av samlaðu íløguni. Kirkjubøar Kommuna hevur søkt Almannamálaráðið um stuðul eftir hesi skipanini.

– Men nú varð val útskrivað, meðan arbeitt verður við hesum, so nú vita vit einki, hvussu verður. Vit mugu nokk bíða eftir einum nýgjum landsstýri, sigur borgarstjórin í Kirkjubøar Kommunu.

Tað verður tó ikki Kirkjubøar Kommuna, sum fer at lata ellisheimið í Kirkjubø byggja, vísir Anfinn Brekkstein á.

Kirkjubøar Kommuna hevur tikið stig til verkætlanina og letur hann gera klára til sjálva byggingina.

Samtykt er at leggja Kirkjubøar Kommunu og Tórshavnar Kommunu saman, so tá tað kemur til, at farast skal undir sjálva byggingina, verður tað Tórshavnar Kommuna, sum kemur at standa fyri tí partinum, sigur Anfinn Brekkstein.

# Útbyggingarætlanir í Vágum

**Arbeitt verður við ætlanum um at byggja ellis- og røktarheimið í Miðvági út til at hýsa 13 fólkum aftur at teimum 36, sum í løtuni búgva á heiminum**

ELDRARØKT
*Edvard Joensen*



*Arbeitt verður við ætlanum um at byggja upp í ellis- og røktarheimið í Miðvági - mitt í myndini - út móti Giljanesi*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:** Kommunurnar í Vágum arbeiða við ætlanum um at byggja ellis- og røkttarheimið í Miðvági út við einum triðingi.

Eins og aðrastaðni er tørvurin á eldrarøkt í Vágum alsamt vaksandi. Arbeitt hevur verið við ymsum møguleikum til at loysa hendan spurningin, og kommunurnar í oynni eru hvør sær í ferð við at finna eina loysn, sum allar kommunurnar kunnu taka undir við.

Sandavágs Kommuna fer á bygdarráðsfundi í kvøld at viðgera málið, sum snýr seg um útbygging av ellis- og røktarheiminum í Miðvági.

Ein av hinum kommununum í Vágum, Sørvágs Kommuna, hevur havt málið til viðgerðar, og hevur tikið støðu við ávísum treytum, sigur Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági.

Hann sigur, at treytirnar eru, at hinar kommunurnar í oynni eisini taka undir við, at ein samlað loysn , sum umfatar alla eldrarøkt í oynni, verður funnin.

Ymsir møguleikar hava verið nevndir, men nú er tað komið til, at tað í fyrsta umfari helst verður farið undir at byggja ellisheimið út við trettan búplássum, sigur borgarstjórin í Sørvági. Byggingin skal gerast í forlongilsi av verandi bygningi móti Giljanesi, sigur hann.

Talan er um at byggja út, so pláss fæst fyri 13 fólkum afturat, sigur Eivin Jacobsen, Kostnaðurin verður mettur til góðar 17 milliónir, sum skal býtast út á kommunurnar í Vágum. Tó kann upp til helvtina av hesi upphædd fáast í stuðuli frá Almannamálaráðnum, sum letur ein hálva millión, tó í mesta lagi helvtina av íløguni, í stuðuli til slíka bygging.

Eivin Jacobsen sigur, at hann er fyri at fáa alt eldraøkið savnað undir ein hatt í oynni. Og tað er líkasum ein treyt fyri, at Sørvágs Kommuna er við til hesa útbyggingina, at arbeitt verður víðari við tí hugskotinum, sigur hann. Somuleiðis má arbeiðast fram í móti, at øll umsiting av økinum eisini verður felags fyri oynna, sigur hann. Tað ber ikki til, at hvør komuna sær skal umsita hetta í sínum lagi.



# »I ærlige brudefolk…«

**Bók um brúdleypssiðir í Føroyum er útkomin. Høvundur er Jóan Pauli Joensen**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*



Brúdleypsbókin hjá Jóan Paula Joensen I ærlige brudefolk. Bryllup på Færøerne, sum danska forlagið Museum Tusculanum Forlag, Københavns Universitet gevur út, kom til Føroyar við Norrønu mánadagin.

Henda sera snotiliga og innbundna bókin er ein siðsøgulig lýsing av brúdleypi í Føroyum frá umleið 1500 til 2002. Greitt verður frá giftermáli og brúdleyp og teirri siðvenju ið hevur hingið uppi í hesum og hvussu siðirnir eru broyttir upp gjøgnum tíðina.

Lesarin verður verður tikin við sum gestur til gomul føroysk bygdabrúdleyp eins væl og nýggjari brúdleyp bæði í kirkjuni og í øðrum samkomun. Har verður greitt frá hvussu fólk funnu saman, brúðarvígslu, ofri, gávum, songarleiðing, brúdleypsmati, brúdleypsklæðum, drunni, brúðardansinum og øllum tí sum fólk seta í sambandi við brúdleyp.

Eisini eru allir teir nýggju siðirnir sum polterabend og skemt við moderna brýdleypsborð lýst væl og virðiliga. Bókin byggir á alt tað,,sum er til skjals um brúdleyp í Føroyum og høvundurin hevur eisini savna nýtt tilfar frá prestum, studentaskúlanæmingum o.ø. Hetta er fyrstu ferð at brúdleyp í Føroyum er lýst í síni heild í bók við myndum í litum.

Bókin er 300 blaðsíðir í tveimum stórum teigum. Hon hevur eina rúgvu av myndum bæði svart/hvítar og í litum.

Bókin verður í øllum bókabúðunum 17. desember, kanska fyrr. Hon kosar 325 í bókabúðunum.

# Tordur gevst í landspolitikki



LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tordur Niclasen, sum hevur verið tingmaður í fleiri ár og eitt skifti eisini var landsstýrismaður, stillar ikki uppaftur til løgtingsvalið 20. januar.

Á valinum í fjør hevði Tordur Niclasen 151 persónligar atkvøður. Næsti maður á listanum var Eyðun Jacobsen, sum fekk 65 atkvøður, meðan Bill Justinussen, sum gjørdist landsstýrismaður, fekk 55 atkvøður.

Tordur Niclasen er leiðari á Ellis- og røktarheiminum í Runavík og borgarstjóri á Eiði.




Henda áttanda og seinasta bókin í røðini viðger bráða endan, sum føroyska virksemið í Grønlandi fekk.

Seinast í sekstiárunum var so kalt og so nógvur ísur í Grønlandi, at lítið var at fáa. Flestu skipini funnu sær aðrar leiðir, og útróðrarmenninir góvust at fara til Grønlands um summarið. Við hesum fór ein serlig vinna í søguna.

Um sama mundið fóru føroyingar undir nýggjar vinnur í Grønlandi. Fyrst varð farið at fiska laks við gørnum og síðan at trola eftir rækjum. Hetta virksemið eydnaðist og kastaði væl av sær, meðan vit enn høvdu rættindi undir Grønlandi. Tá ið Grønland fór upp í Felagsmarknaðin, broyttust okkara møguleikar, og nú vóru rættindi ikki longur eitt mál, ið kundi avgerast millum ríkispartarnar. Longu í 1970 varð umhugsað at steingja støðina í Føroyingahavnini, men hon andi kortini heilt til 1989, tá ið landskassin ikki longur vildi gjalda.

Hetta var formligi endin á einum sera týdningarmiklum skeiði í føroyskari vinnulívs- og samfelagssøgu.

**Jógvan Arge**

299,-

SANSIR 355 355



20 ár við Velbastaðvegin

19. desember 2003 eru 20 ár liðin, síðan avgreiðslan hjá Föroya Bjór læt upp við Velbastaðvegin í Havn



29. oktober í fjør varð avgreiðslan nútímansgjørd við sølubúð. Hetta hevur bøtt so nógv um umstøðurnar, at í dag tekur tað bert lítla løtu at avgreiða teir nógvu kundarnar. Onkrar dagar verða í meðal 2 kundar avgreiddir um minuttin

Föroya Bjór

Sosialurin 341800